Vikuskiftis Sosialurin



## Tøkk

Vit takka hjartaliga øllum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá kæru foreldur okkara

**Christina og Johannes Petersen**
Tórshavn

andaðust og vóru jarðað

Tøkk fyri góð orð í Kapellinum, í Ebenezer og á grøvini.
Tøkk til Ebenezerkórið og til tykkara í køkinum.
Tøkk til starvsfólkið á Hotel Tórshavn í Keypmannahavn, og á Landssjúkrahúsinum.
Tøkk fyri kransar, blómur og fyri gávur til Zarepta.
Tøkk til tykkum mongu sum fylgdu teimum til teirra seinasta hvíldarstað her á fold.

*Fyri tey avvarðandi*
**Debes, Hans og Kári við familjum**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá kæri pápi, sonur, beiggi, svágur og gubbi okkara

**Olaf Hans Jacob Ellingsgaard**
ættaður av Eiði,
búsitandi í Tórshavn,

brádliga andaðist og varð jarðaður.
Tøkk til Emil Olsen, prest, tøkk til sangarar, kirkjutænarar, berarar, gravarar og M. C. Restorff fyri sang og spæl.
Tøkk til tykkum, sum stóðu fyri ervinum, sum bakaðu, og sum á ein og annan hátt hjálptu til.
Tøkk fyri heilsanir, blómur og kransar.
Takk fyri tit øll, sum fylgdu babba til hansara seinasta hvíldarstað.

*Vegna tey avvarðandi*
**Karin, Anna Davina og Tummas**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá kæri pápi og abbi okkara

**Hansias F. Skarðheim**
Porkeri

andaðist og varð jarðaður.
Ein serlig tøkk til Dánjal á Dul Jacobsen fyri hjálp og beinasemi.
Takk til berarar.
Takk til tykkum, ið hjálptu til við ervinum.
Takk til tykkum mongu, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Guðbjørg**

# Heilsan til Kristian Martin



Tað er við stórari gleði, eg setist at skriva nakrar reglur um heimið á Selheyggi, har Lena og Palli settu búgv. Hvussu trivaliga hetta heim hevur myndað okkara bygd og okkara land. Tá vit hugsa um Palla, hesa fiskirótina, sum oftani skaraði langt framúr til fiskiskap og skil, tá mugu vit bert takka Gudi fyri eitt slíkt heim sum hjá Lenu og Palla. Tað næsta ættarliðið og tað triða við, tey bregða ikki úr ætt og hava somu fiskieydnu, tað má sigast at vera ein stór gleði.

Palli livdi sítt egna lív. Til eina heimreisu við Polarstjørnuni, komnir eystur um kappan, tá møtti hann Harranum, sum við stóru náði Síni gav Hann honum hjartafrið og eitt ævigt lív. Lena hevði lagt honum eitt Nýggjatestamenti í sekkin henda túrin, sum bar góðan ávøkst.

Nú um dagarnar fór sonur teirra, Kristian Martin, um tey 60, og vilja vit siga hjartaliga tillukku og takk fyri nógvar góðar løtur saman, summar har í køkskrókinum. Jonelisa hevur hugnað um okkum, tá vit saman við dreingjunum høvdu eina løtu um Harrans orð, tær løturnar verða seint gloymdar.

Kristian Martin - at fortelja øðrum her í blaðnum, um øll tey stórverk Harrin hevur unt tær at avrika innan fiskiveiðuna, er heilt óneyðugt. Tað er, sum tað stendur í Bókini, Áps. 26-26, hetta hevur ikki hent í nøkrum avkróki. Vit hava mangan sæð tey søkklatnu skip, tú við tíni manning hevur ført á vánna, tað mugu vit takka Harranum fyri, og síðani er søgan tann sama hjá tær, sum hjá pápa tínum, at tú fanst Kristus á sjónum ella Hann teg, umborð á Klakki á veg til Grønlands. Tað hevur virði, fram um øll onnur virði, tú náddi her á fold, bert ævinleikin skal vísa tað, at hetta var títt besta kast, tá tú fekst Kristus í títt hjarta.

Greta og Levi ynskja tær hjartaliga tillukku við teimum 60 árunum og siga takk fyri alt, hvat tit hava verið fyri okkum. Enn einaferð bestu heilsu og Guds signing.

**Malta, Hirtshals,**
**tann 7. mai 2007**

Sr. Briege McKenna:

# Heimskend nunna kemur til Føroya

Hósdagin 5. juli 2007 fáa vit í Føroyum forkunnuga vitjan. Tað er tann heimskenda nunnan Sr. Briege McKenna, og presturin Kevin Scallon, sum bæði eru úr Írlandi, sum koma á vitjan.

Eftir at hava verið í Danmark og Norra, koma tey til Føroyar. Saman við teimum kemur eisini p. Benny Blumensaat. Tey verða her til 9. juli, og fara síðan víðari til Íslands.

Sr. Briege McKenna hevur skrivað bókina “Miracles do happen”, sum finst bæði á enskum og donskum. Bókin hevur kveikt íblástur og grøðing til óteljandi menniskju, har hon sigur frá um sína egnu likamligu grøðing og kallinum til “grøðingar-tænastunu”.

Sr. Briege fór sum 15 ára gomul í kleystur hjá “The sisters of St.Clare”. Í fleiri ár var hon avlamin av »rheumatoid arthritis«, men 24 ára gomul varð hon »knappliga« grødd yvirnatúrliga undir bøn. Seinni fekk hon grøðingar náðigávu, sum hava gjørt hana heimskenda.

Hon ferðast runt um allan heimin saman við Fr. Kevin Scallon, sum er katólskur prestur, og biður fyri grøðing. Serliga eru tey kend fyri at hava “retretur” fyri katólskar prestar, til andaliga endurnýggjan av prestastættini.

Leygardagin 7. juli verður grøðingargudstænasta (á føroyskum og enskum) í Vesturkirkjuni, og sunnudagin 8. juli verður messa og bøn fyri grøðing í Mariukirkjuni.

Nærri verður at frætta um skránna seinni. Kunning á www.sisterbriege.com



*Sr. Briege McKenna*

## Tøkk

Takk til øll, sum sýndu samkenslu, tá pápi mín

**Mass Andrias Fitjar**

andaðist.
Eg vil eisini takka Landssjúkrahúsinum, deild G1 og G4 fyri eitt megnar arbeiði.

*Familjunnar vegna*
**Dagny Holmsen**

**Dagurin**

**12. mai. Pancratius** deyður í umleið 300. 13 ára gamal drongur, sum varð tikin av døgum fyri trúar sakir.

**Dagurin 13. mai. Ingenuus.** Rómverskur kristin hermaður, sum keisarin Decius læt drepa.

**14. mai er Tjóðarhátíðardagur Ísraels.** Hendan dagin plaga vinafeløgini hjá Ísrael at hátíðarhalda, eisini í Føroyum. Í ár var einki undantak. Ísraelsfelagið og Vinir Ísraels skipaðu fyri fundi í gamla Kommunuskúlagarðinum.